# Uppstilling til formansval

## í Starvsmannafelagnum

Sambært § 12, stk. 3 í lógum felagsins verður boðað til uppstilling til formansval í Starvsmannafelagnum.

Fastur formaður skal veljast á aðalfundi felagsins í mars 2006. Uppstillingin skal verða liðug innan 15. januar 2006.

Uppstillað verður á tann hátt, at boðað verður skrivstovu felagsins skrivliga frá, at limur sjálvur ynskir at stilla upp, ella at limur ella limir ynskja at stilla annan lim upp. Stillar limur ella stilla limir annan lim upp enn seg sjálvan, skal samtykki valevnisins fylgja við uppstillingarfráboðanini.

Tann skrivliga frásøgnin um uppstilling skal verða skrivstovu felagsins í hendi ikki seinni enn 15. januar 2006. Í frásøgnini skal verða tilskilað navn og bústaður hjá valevninum, og hvar valevni arbeiðir.

Formansstarvið er lønt, og bert tann, sum tekur starvið upp sum fulltíðarstarv burturav, kann verða valdur. Sambært sáttmálan hevur tann, sum verður vald/ur til formann í felagnum rætt til at fáa farloyvi frá arbeiðsplássinum alla formanstíðina, soleiðis at stovnurin hevur skyldu til at hava starv til hana/hansara, tá formanstíðin er úti.

Aðalfundurin velur formannin beinleiðis við vanligum meiriluta.

Limir verða, í seinasta lagi tá aðalfundurin verður lýstur, kunnaðir um, hvørji formansvalevni verða at velja ímillum á aðalfundinum.

Víst verður annars sum heild til § 12 í felagslógini.

Fráboðanir um uppstilling verða at senda til

**Starvsmannafelagið**
**J.H. Schrøtersgøta**
**Postboks 165**
**110 Tórshavn**

# Kunngerð

Almennu býráðsfundirnir hjá Vágs býráð í 2006, verða hesar dagar:

| | |
|---|---|
| Týsdagin 10. januar | Týsdagin 7. februar |
| Týsdagin 14. mars | Týsdagin 25. apríl |
| Týsdagin 23. mai | Týsdagin 20. juni |
| Týsdagin 12. september | Týsdagin 10. oktober |
| Týsdagin 14. november | Týsdagin 12. desember |

Fundirnir eru settir at verða kl. 17.30 um ikki annað verður fráboðað.

Vágur, tann 7. desember 2005
**Vágs býráð**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Grundskeið í lóg

Í vár skipar Søgu- og Samfelagsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya fyri undirvísing í grundskeiði í lóg. Grundskeiðið er 15 ECTS, ið svarar til ¼ ársverk. Skeiðið fevnir um ein almennan part, ið verður settur saman av pørtum sum: *at finna lóg, at skipa lóg, at smíða lóg, at tulka lóg* og einum serligum parti settur saman av *brotum úr galdandi stjórnar- og fyrisitingarlógum, serliga stýrisskipanarlógini, heimastýrisskipanini, ríkisgrundlógini, fyrisitingarlógini og innlitarlógini.*

Skeiðið er ætlað lesandi á setrinum, fólki við aðrari hægri útbúgving enn í løgfrøði, fólki við fyrisitingarligum royndum, ið hava tørv á eftirútbúgving, men onnur kunnu eisini, um pláss verður, skriva seg inn. Fyritreytin er tá ein miðnámsútbúgving ella samsvarandi.

Undirvíst verður tvær ferðir tveir tímar um vikuna, týskvøld og hóskvøld, kl. 16.15 -18.00, í Ovastovu, Nóatún.

Undirvísingin byrjar hósdagin 2. februar 2006 og endar við skrivligari próvtøka hósdagin 1. juni 2006.

Lærarar verða løgfrøðingarnir Kári á Rógvi, Heðin D. Poulsen, Jógvan Elias Winther Poulsen og Johnhard Klettheyggj.

Kostnaður fyri skeiðið er kr. 6.000, íroknað skeiðstilfar. Harafturat kemur próvtøkugjald kr. 1.000.

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til Søgu- og Samfelagsdeildina, J.C.Svabosgøta 7, 100 Tórshavn, tlf. 352580. Víst verður eisini til heimasíðuna: www.setur.fo

**Umsóknarfreistin er sett til mánadagin 16. januar 2006.**

# Vestmanna Skúli

Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv til heimaundirvísing við næmingi í 9. flokki.

Undirvísingartímatalið um vikuna er 10 tímar, galdandi frá 2. januar 2006 og 20 vikur fram.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 470100 ella 424449, ella frá Jógvani í Dávastovu, formanni í skúlastýrinum, tlf. 424566.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 28. desember 2005.

**Vestmanna Skúlastýri**

v/ Jógvan í Dávastovu
350 Vestmanna

# Byggilendi undir Gráasteini/ Millum Horna



Um hóskandi boð fæst verður kommunala ognin Byggiøkið við Undir Gráasteini/Millum Horna lýst til sølu.

Ognin er matr. nr. 1119 Tórshavn og er uml. 10.835 m2 til støddar, av hesum liggja uml. 5.100 m2 í A2 økisparti - høg bústaðarbygging og restin í A1 økisparti - stakhús.

Sølan er treytað av, at nóg høgt boð fæst og at bygt verður á økinum innan 2 ár frá søludegnum.

Boðini skulu verða skrivlig.

Upplýsingar um nærri treytir fyri søluna annars/ognina fæst við at venda sær til:

**Advokatgarðin**
v/ Julionnu Klett
Bringsnagøta 15 · Tórshavn
Tlf. 311744 · avgreiðslutíð: má.-fr. 10-16

**Eysturoyar Røktar- og Ellisheim**
**620 Runavík**

**Søkir avloysara fyri**

# Ergoterapeut

0,7 tíð - at byrja skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

Starvstíðin er til 21. august 2006.

Løn- og setanartreytir: sambært galdandi sáttmála.

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá fyristøðumanninum á tlf. 448185 ella 448201 lokal 26.

Umsókn, saman við avriti av prógvi v.m. skal vera komið á heimið innan 28. desember 2005 kl. 12.00.

Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn